LM-053/2025

Kommunufelagið

Dagfesting
5. november 2025

Løgmálaráðið
Gongin 7
Postrúm 377
100 Tórshavn

Okkara j.nr.
25/09458-3

Málsviðgeri
Janus Haraldsen

Tygara j.nr.
25/23488

Viðv. uppskotinum um at geva kommununum heimild at yvirvaka serliga útsett øki

Hin 8. oktober 2025 sendi Løgmálaráðið uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli til ummælis.

Kommunufelagið hevur viðgjørt uppskotið á borgarstjórafundi 31. oktober 2025 og hevur hesar viðmerkingar.

Bakgrund og endamál við uppskotinum

Uppskotið hevur sín uppruna í løgtingssamtykt nr. 69/2023, har Løgtingið heitti á landsstýrið um at leggja fram lógaruppskot, ið gevur kommunum heimild at seta upp vakmyndatól á serliga útsettum støðum.

Sambært uppskotinum er endamálið at geva kommunum heimild til – í samráð við politiið og eftir tilmæli frá politinum – at yvirvaka øki, sum verða nýtt til vanliga ferðslu, við tí endamáli at økja trygdina í serliga útsettum økjum. Tilmælið frá politinum skal endurnýggjast annaðhvørt ár, og heldur ein kommuna ikki hesa freist, er talan um ólógliga yvirvøku. Upptøkur skulu strikast innan 30 dagar, og kommunan hevur ábyrgdina av, at yvirvøkan fer fram í samsvari við dátuverndarlógina og aðra lóggávu. Kommunan kann ikki sjálv brúka upptøkurnar, tí upptøkurnar einans kunnu latast víðari til politiið til kanningar av álvarsomum lógarbrotum.

Óvanlig fyrisitingarlig skipan

Uppskotið leggur upp til eina heldur óvanliga fyrisitingarliga skipan, har tað er kommunan, sum skal eiga, seta upp og reka vakmyndatólini – men hetta kann bert gerast tað við loyvi frá politinum og tað er einans politiið, sum kann brúka upptøkurnar.

Samstundis er tað kommunan, ið hevur ábyrgdina av at skipanin er í samsvari við lógina og at teknisku loysnirnar eru nøktandi.

Úrslitið er sostatt, at tann myndugleikin, sum hvørki sleppur at síggja ella nýta upptøkurnar, kortini fær ábyrgdina av teknisku skipanini og av lógligheitini av yvirvøkuni.

Kommunufelagið

Hesa skipan heldur felagið ikki kann varðveitast. Fær kommunan ongar møguleikar at nýta upptøkurnar til egin endamál, so má hetta heldur vera ein uppgáva, ið verður lyft av landinum ella politinum einsamalt.

Kommunufelagið tekur sostatt ikki undir við einari so avmarkandi skipan, har bert heilt fá álvarslig lógarbrot verða fevnd, og har íløgurnar í skipanirnar í grundini onki kommunalt endamál hava.

Møguleiki hjá kommunum at nýta upptøkur

Uppskotið gevur sum nevnt ikki kommununum nakra heimild at nýta upptøkurnar. Hetta hóast slík nýtsla í ávísum førum kundi verið viðkomandi. Talan kundi til dømis verið um eftirmeting av trygdarátøkum í sambandi við almenn tiltøk, fyribyrging av herverki, skipan av býarrúmum ella betring av ferðsluviðurskiftum.

Ein avmarkað heimild til slíka kommunala nýtslu kundi tryggja at íløgurnar í yvirvøkuskipanir komu einum breiðari skara til góðar. Felagið mælir til, at verður tað ein kommunal uppgáva at fáast við skipaða yvirvøku av almenna rúminum, so skal tað eisini vera møguligt at nýta upptøkurnar til onnur saklig kommunal endamál.

Ósamsvar millum kostnað og nyttu

Kommunurnar hava skyldu at virka so fíggjarliga skynsamt sum til ber við tí skatti, ið verður kravt inn frá borgarunum. Og so vítt gjørligt eiga kommunalar raðfestingar at koma einum breiðum skara til góðar.

Í fyriliggjandi uppskoti verður loyvda yvirvøkan avmarkað heilt munandi. Tað verður sostatt avmarkað, hvørji lógarbrot kunnu fevnast, og onnur rímiliga nýtslu av upptøkunum verður somuleiðis útilokað.

Hetta ber í sær at samfelagsligu íløgurnar í keyp og rakstur av yvirvøkuskipanum í ringan mun koma at standa mát við tann avmarkaða týdning, sum upptøkurnar kunnu fáa í praksis.

Ein víðari heimild at nýta upptøkurnar hevði givið eitt væl betri samsvar millum kostnað og nyttu. Eisini av hesi orsøk eigur tað at vera gjørligt at nýta upptøkurnar til saklig kommunal endamál.

Umsitingarligar avbjóðingar

Uppskotið áleggur kommunum fleiri umsitingarligar uppgávur, herundir truplar tøkniligar og løgfrøðiligar metingar. Millum annað skal kommunan støðugt tryggja, at upptøkur verða

Kommunufelagið

goymdar á lógligan hátt og strikaðar rættstundis, at atgongd verður stýrd, og at dátuverndin verður hildin í hásæti. Harumframt skal grundarlagið fyri yvirvøku regluliga metast av nýggjum, sum í sjálvum sær er umsitingarliga tungt og krevjandi.

Samstundis má tað hinvegin metast sum ósannlíkt at hesi útsettu øki broytast so nógv innan tvey ár, at grundarlagið fyri yvirvøkuni knappliga verður burtur. Við hesum í huga kann uppskotið tykjast óneyðuga umsitingarliga tungt.

Felagið mælir til at hyggja nærri eftir umsitingarligu byrðunum, sum fara at standast av uppskotinum. Ítøkiliga verður mælt til at taka burtur ella í minsta lagi leingja freistirnar munandi fyri, nær nýggjar metingar skulu gerast.

Støðug yvirvøka

Í sambandi við stór tiltøk, almennar vitjanir, landsdystir o.a. kann tørvur møguliga vera á støðugari yvirvøku allan sólaringin í eitt avmarkað tíðarskeið. Hetta eigur í so fall at verða greitt heimilað í lógini.

Fyriliggjandi uppskot er so avmarkandi, at støðug yvirvøka av serligum tiltøkum má metast at vera útilokað. Felagið mælir Løgmálaráðnum til at kanna og taka støðu til, um hetta eigur at verða loyvt, t.d. við einari skipan við hissini yvirvøkuloyvi.

Atgongd til upptøkur og rættartrygd

Tað tykist nakað ógreitt, undir hvørjum treytum politiið kann fáa atgongd til upptøkurnar. Við atliti til rættartrygdina hjá borgarum eigur at verða ásett í lógini, at politiið bert kann fáa atgongd eftir vanligari mannagongd við rættarúrskurði. Hetta hevði tryggjað, at ein óheftur dómari tók støðu til, um treytirnar fyri at lata upptøkurnar vóru loknar.

Ein slík skipan hevði ikki verið til stórvegis ampa fyri løgregluna, men hevði hinvegin styrk álitið á og undirtøkuna fyri skipanini. Felagið mælir tí til at broyta uppskotið samsvarandi.

Vegna
Kommunufelagið

Torbjørn Jacobsen
formaður

Eyðun Christiansen
stjóri